### Til kommunulæknar

# Mannagongd í samband við ávísing til kliniskan dietist

Kommunulæknar kunnu ávísa borgarar til kliniskan dietist, um teir meta at tørvur er fyri tí, og um borgarin lýkur niðanfyristandandi treytir. Dietistarnir hava felags visitatión av ávísingum, men borgarar verða kallaðar inn til viðtaluhølir í Tórshavn, í Kollafjørð, í Miðvági, á Sandi, í Runavík, í Klaksvik, í Vági og á Tvøroyri .

Dietistarnir hava felags visitatión av ávísingun og dietisturin í umráðum hava ábyrgduna av at innkallað og bókað til viðtalu.

## Hvør kann ávísast til kliniskan dietist í primærsektorinum

(Meira útgreinandi upplýsingar seinni í skrivinum)

**Vaksin (>18 ár) við**:

- Diabetes Mellitus Typu 2 (HbA1c ≥ 48 mmol/mol)
- Prediabetes (HbA1c millum 42-47 mmol/mol)
- Dyslipidæmi (hyperkolesterolæmi, hypertriglyceridæmi) og/ella hjarta-æðrasjúku
- KOL
- Føðslutroti (BMI < 20,5 kg/m$^2$, ótilætlað lætnan og/ella ringan matarlyst orsakað av sjúku)
- Yvirvekt (BMI > 30 kg/m$^2$, ið eru byrjaði uppá vekttapsheilugvág
- Ovurfiti við fylgitrupulleikum (BMI >35 og ein ella fleiri trupulleikar/komplikasjónir)
- Gastroenterologiskum trupulleikum
- Matvøruovurviðkvæmi (allergisk og ikke allergisk) og intoleransa

**Børn við:**

- BMI > 90% percentilin (+2SD)
- Ringum trivnaði (-2SD) og/ella sera einstáttaðum matvanum
- Matvøruovurviðkvæmi (allergisk og ikke allergisk) og intoleransa

**Gev gætur**

Vaksin og børn við typu 1 diabetes og kvinnur við gestationel diabetes skulu fylgjast á Landssjúkrahúsinum. Komplisera inntoleransa og/ella matvøruallergi verður enn knýtt at dietistinum á Landsjúkrahúsinum

## Mannagongd

Ávísing verður send við Cosmic til "dietistar í primera økinum". Ávísingin er at finna undir skiljibladnum Rekvisition og svar > Registrer henvisning > Udadgående, har "modtagende enhed" er Dietistar í primæra økinum.



Dagført juni 2023 av dietistunum í Økisheilsuskipanini

# Ávísingartreytir

Tað er umráðandi at viðkomadi upplýsningar eru um aktuellu støðu, sjúkrasøgu, komorbitiet og hvat ið er gjørt við trupuleikan áður, fyri at optimera viðgerðina. Vekt og hædd skal vera aktuel. Allar relevantar mátingar skullu í mesta lagi verða 3 mánaðar gamlar og listin við heilivági skal verða dagførdur.

## Útgreinandi upplýsingar til ávísingar

**Vaksin við Diabetes Mellitus typa 2 og Prediabetes**

- Sjúklingar við typu 2 diabetes (HbA1c: ≥ 48 mmol/mol), har broytingar i matvanum og lívsstíli kunnu betra um metabolisku risikomarkørar
- Borgarar við prediabetes (HbA1c: 42-47 mmol/mol) Dietviðgerð kann minka um vandan fyri at útvikla diabetes

Neyðugar mátingar:

- Blóðtrýst, HbA1c, serumlipidir (total-kolesterol, HDL-kolesterol, LDL-kolesterol og triglycerid)
- Vekt og hædd

**Dyslipidæmi og/ella hjarta-æðrasjúku**

- Borgarar við hypertensión, dyslipidæmi, har læknin metir, at dietviðgerð kann minka um vandan fyri álvarsligari hjarta-æðrasúku
- Eisini sjúklingar, ið hava hjartaæðrasjúku, har læknin metir at dietviðgerð kann fyribyrgja fleiri tilburðum

Neyðugar mátingar:

- Blóðtrýst, HbA1c, serumlipidir (total-kolesterol, HDL-kolesterol, LDL-kolesterol og triglycerid)
- Vekt og hædd

**Vaksin við KOL og/ella føðslutroti**

- BMI <20,5 kg/m$^2$ ella ótilætlað lætnan í samband við álvarsliga sjúku sum krabbamein ella KOL og/ella ringan matarlyst orsakað av sjúku
- *Um føðslutrot er orsakað av etingarólagi t.d. anorexi ella ortorexi, verður ávíst til psykiatriina*

Neyðugar mátingar:

- Vekt og hædd

**Vaksin við yvurvekt**

- BMI >30 $kg/m^2$har ábending er um at vekttapsheilivágur afturat lágari kaloriuinntøku og meira rørslu hjálpur
- BMI >35 $kg/m^2$við fylgitrupulleikum, har vekttap væntandi hjálpur uppá trupulleikar til dømis svøvnapnø, hypertensión, liðapína, krav um at fara niður í vekt innan aðra viðgerð og manglandi bláu bók orsakað av fiti
- *Sum nú er kunnu vaksin við ókompliseraðum adipositas ikki vísast til dietist í primera økinum. Við etingarólag, har fiti er ein trupulleiki ma. Bing Eating Disorder (BED), verður ávíst til psykiatriina*

<u>Neyðugar mátingar:</u>

- Vekt og hædd

**Vaksin við gastroenterologiskum trupulleikum**

- Við illgruna um irritablan tjúkktarm (IBS) og sjúkrueyðkenni, sum minn um IBS útfrá Rom III treytum
- Leyst lív, hart lív ella aðrir magatarmtrupulleikar,ið kunnu setast í samband við aðra sjúku

<u>Neyðugar upplýsingum/mátingar</u>

- um sjúkugongd, møguligar innleggingar, familierar diagnosur og núverandi støðu

**Matvøruovurviðkvæmi (allergisk og ikke allergisk) og intoleransa**

- Við staðfest matvøruovurviðkvæmi herundir
  - Egg
  - Mjólk
  - Soya
  - Jarðnøtur og trænøtur
  - Fisk og skeljadjór
  - Hveiti (gluten)
  - Lactosuintoleransu

*Kompliseraðar matvøruintoleransur og/ella matvøruallergi eru framhaldandi knýtt at dietistunum á Landsjúkrahúsinum*

**Børn við adipositas**

- Børn frá 2 ára aldri við BMI yvir 90% percentil (+2SD) sambært vakstrarkurvu í Cosmic ella sambært hesum kurvum
  - Piger – BMI for alder http://xn--vkstkurver-d6a.dk/PDF/pige_BMI_0_20_aar.pdf
  - Drenge - BMI for alder http://xn--vkstkurver-d6a.dk/PDF/dreng_BMI_0_20_aar.pd

<u>Neyðugar mátingar og upplýsingar:</u>

- Upplýsingar um ættarbregði
- Dagførdar vekt, hædd og vakstrarkurvar

**Børn í ringum trivnaði**

- Lágt BMI ella ikki fylgir vakstarkurvuni  BMI sambært vakstrarkurvum
- Einstáttaðar matvanar, har læknin metir at vandi er fyri skeivari føðslu og/ella føðslutroti

<u>Neyðugar mátingar og upplýsingar:</u>

- Læknalig meting av, hvør orsøkin er til trupulleikan
- Dagførdar vakstrarkurvar

Matvøruovurviðkvæmi (allergisk og ikke allergisk) og intoleransa

- Við staðfest matvøruovurviðkvæmi herundir
    - Egg
    - Mjólk
    - Soya
    - Jarðnøtur og trænøtur
    - Fisk og skeljadjór
    - Hveiti (gluten)
    - Lactosuintoleransu

*Kompliseraðar matvøruintoleransur og/ella matvøruallergi eru framhaldandi knýtt at dietistunum á Landsjúkrahúsinum*

## Stutt um kliniskar dietistar

Heitið kliniskur dietistur er eitt vart heiti og kann bert brúkast av persónum við løggilding frá danska Sundhedsstyrelsen. Ein kliniskur dietistur hevur eina føðsluvísindaliga professionbacholor útbúgving uppá 3½ ár, og nakrir hava harumframt kandidatútbúgving. Kliniskir dietistar eru einasti fakbólkur, ið hava eina náttúruvísindaliga útbúgving innan viðgerð av føðsluligum sjúkum og eina umfatandi vitan um sambandið millum mat, heilsu og sjúku.

## Dietviðgerð

Dietviðgerð er primært ein einstakliga vegleiðing. Dietviðgerð hevur til endamáls at varðveita ella at endurskapa eina nøktandi føðslustøðu. Fyrsta viðtala varar umleið 1 tíma, og uppfylgjandi samrøður vara umleið 30 min.
Í dietviðgerðini samla vit upplýsingar um matvanar (kostanamnesu) og diagnosu/føðslutrupulleikar og vegleiða, fylgja upp og eftirmeta.

## Samband:

Felags teldupostur: dietist@kl.fo

Beinta Mohr Leo, aut. kliniskur dietistur í Vági og á Tvøroyri. Samskipari av dietistinum. Tlf. 793031
Did Nicolajsen, aut. kliniskur dietistur í Tórshavn, á Sandi, í Kollafirði og í Miðvági. Tlf 793034
Jórun Klein, aut. kliniskur dietistur í Tórshavn, á Sandi, í Kollafirði og í Miðvági. Tlf. 793035
Katrine Lindberg Hansen aut. kliniskur dietistur í Runavík og Klaksvík. Tfl. 793036



Dagført juni 2023 av dietistunum í Økisheilsuskipanini